## Viðmerkingar

# Amariel, Tróndur, Bárður, Kári, Ingolvur, Olivar, Torbjørn & øll hini gávuríki fólkini



Í Havnini búgva nógv góð listafólk. Hesi eru okkara **Mentunarsendiharrar** sum gera Havnina og Føroyar kend úti í heiminum. Í næstum verður stór framsýning í **New York** har fleiri av hesum luttaka.

Vit frøast og gleðast um listina og taka hana sum nakað sjálvfylgiligt sum ger lív okkara ríkari. Tað er tó ikki altíð líka lætt hjá hesum fólki, sum liva av listini, at fáa endarnar at røkka saman. Bert til máling og útgerð nýtir ein listarmálari umleið Kr 7.000,- um mánaðan. Synd er at siga at Býráðið stuðlar hesum fólkum.

**Komandi Býráð** eigur at stuðla hesum fólki **fíggjarliga** so at tað **munar**. Býráðið skal eisini stuðla við at byggja **atelier** til okkara listarfólk og sum eisini fremmand listarfólk kunnu nýta.

Vit hava **Listarskálan.** Hann er ikki tíðarhóskandi longur. **Nýggjir skálar** skulu umhugsast.

Vit eru errin av okkara listarfólki. Tey ríka okkum, men hava vit eina **moralska skyldu** yvirfyri teimum.

Tey skulu hava umstøður at nýta sínar **gávur** og **kreativitet,** ikki til at ganga **biddaragongd** og venda hvørjum fimmoyra, tað er **óverdugt** !

Um eg komi í býráðið skal nakað henda á hesum øki.

**Johan Mortensen**
**Býráðsevni fyri Tjóðveldisflokkin**

---

# Ungdóms- og ítróttarpolitikkur



Tey ungu, sum eru við í ítrótti, ganga í kvøldskúla ella eru við í tónleiki hjá musikkskúlanum, hava rímiligar umstøður.

Tey, sum ikki eru við í teimum vanligu tiltøkunum, hava ikki nóg góðar umstøður, og tær mugu mennast.

Ov fá tilboð um dans og hugna eru til tey ungu, sum eru undir 18 ár. Har skal nakað munagott gerast.

**Ítróttur**
Hópur av fólki íðkar ítrótt í høvuðstaðarumráðnum hvønn einasta dag. Uttanduraítrótturin hevur rættuliga góðar umstøður um summarið.

Men um veturin eru umstøðurnar ikki nóg góðar. Tí er farið undir at byggja eina ítróttarhøll í nýggja býarpartinum Kollafirði, og samtykt og klárt er at fara undir at byggja eina venjingarhøll við skúlan í Hoyvík.

Tað fer samstundis at gera tað liviligari hjá øllum ítróttargreinum, sum verða íðkaðar innandura um veturin.

Og tað skuldi bøtt munandi um umstøðunar.

Ítróttur hevur so stóran áhuga ímillum fólk, at umstøðunar altíð eiga at vera tær bestu.

**Heðin Mortensen**
**býráðslimur og valevni til býráðið**

# Vallyfti



Nú eru skjótt fýra ár síðani eg varð fyri fyrstu ferð valdur í Klaksvíkar býráð. Hvussu hildu nú vallyftir míni?

Eitt týdningarmikið mál, sum eg førdi fram í bløðunum áðrenn seinasta val, var Skúlin á Ziskatrøð, sum so at siga ongar umvælingar hevði fingið í mong ár, heldur ikki ígjøgnum tey víðagitnu 80 ini. Og tá soleiðis er, verður ikki bert talan um vanligar umvælingar, men partvís endurnýgging, slíkt arbeiði kostar ikki smávegis.

**Hvussu nógv er so avsett og hvussu nógv er gjørt í hesari býráðssetuni?**
Eg havi nú saman við hinum býráðslimunum verið við til at gera 4 fíggjarætlanir fyri Klaksvíkar kommunu og í hesi 4 árini eru tilsamans umleið 10 mill. kr. avsettar til umvælinga av Skúlanum á Ziskatrøð. Í hesum 10 mill. kr. eru íroknaðar tær 3.3. mill. kr. sum er settar á fíggjarætlanini fyri ár 2001.

Sum flest øll hav alagt til merkis, er Skúlin á Ziskatrøð nógv broyttur seinastu tíðina.

Tað fyrsta vit gjørdu í hesi býráðssetuni var, at gera eina raðfesting av allari umvæling av skúlanum.

Semja varð um, at lítil nytta var í at umvæla innandura fyrst. Tað hevði verið sum at stoytt nýtt vín í gamlar skinnsekkir.

Støða varð tikin til, at í fyrstu atløgu skuldi skúlin gerast tættur, tí varð nýggj tekja løgd á miðbygningin og síðani varð hann klæddur og vindeyguni vórðu skift út.

Í summar blivu 10 skúlastovur gjørdar av nýggjum og tað kundi ikki verið sami skúli at komið í, so snøggur hann er.

Eisini nýgg innbúgv er keypt til nakrar av nýumvældu stovunum restin kemur eftir nýggjár.

Umvælingin av skúlanum er rættuliga umfatandi og týdningarmikið er, at tá hann nú loksins verður umvældur, at tað ið gjørt verður, er av slíkari góðsku at tað veruliga er ein íløga, sum ikki viðførur øktar rakstrarútreiðslur, við hesum sum grundarlag ganga mong ár til aftur er neyðugt vbið stórumvæling.

Fuglø arkitektar standa fyri projektering og eftirlitið. Umvælingin av Skúlanum við Ziskatrøð skal halda áfram, og ikki eigur at vera helma í fyrrenn allur skúlin er høvuðsumvældur, hetta borga umboð tjóðveldisfloksins fyri, tað er sjón fyri søgn.

**Skrímslið omanfyri Skúlan á Ziskatrøð**
Elevatortornið omanfyri Skúlan á Ziskatrøð sær ikki tespuligt út og man kann spyrja um hetta er eitt annað Bábelstorn, men vit valdu í fyrstu atløgu at sleppa hesi ætlan og halda okkum til nýggju raðfestingina, sum eg trúgvi er tann rætta í eini so umfatandi arbeiðsætlan og sum eisini kemur fyrst og fremst børnunum til góða. Vónandi verður komið við eini loysn til henda partin í komandi býráðssetu.

Eg havi valt bert at viðgera eitt mál í hesari grein míni, men vent verður aftur til onnur mál.

**Steinbjørn O. Jacobsen,**
**varaborgarstjóri**

---

# Umstøðurnar hjá teimum gomlu



Ongin ivast er longur í, at Tilhaldið í Tórsgøtu 21 er komið fyri at vera.

Tilhaldið er vorðin ein natúrligur og vælumtóktur partur av gerandisdegnum hjá teimum gomlu í kommununi.

Og nú hevur býráðið so við samtykt síni 5. oktober sligið fast eina ferð með alla, at húsið - alt sum tað er - skal brúkast sum lið í trivnaðartilboðunum til tey gomlu, ið har savnast.

Eg fari at nýta høvi at ynskja tykkum í Tilhaldinum framhaldandi góða eydnu við frálíka og mennandi virksemi tykkara har.

Somu ynski fara til Pensjonistafelagið, ið m.a. við stuðuli frá býráðnum í dag heldur til í Losjubygninginum við Tinghúsvegin.

Verri stendur til við umstøðunum hjá teimum av okkara gomlu, ið m.a. av heilsuávum ikki hava møguleika at taka lut í teimum tilboðum, ið

Tilhaldið og Pensjonistafelagið hava á skránni. Hesi - og teirra avarðandi - hava sjálvandi eisini krav uppá, at okkurt eisini verður gjørt fyri tey.

Og her verður sanniliga neyðugt at fara miðvíst til verka við teimum alsamt vaksandi bíðirøðunum, ið eru til ellis- og røktarheim umframt eldrasambýli.

Umráðandi er í hesum sambandi sum skjótast at fáa greiði á uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur, so hetta ikki skal darva og leggja fót fyri neyðugum útbyggingum á hesum øki í framtíðini.

Eftir mínum tykki er tað púra upplagt, at ábyrgdin her - eins og á barnagarðsøkinum - eigur at liggja hjá kommununum.

Og eg dugi ikki at ímynda mær annað enn, at hetta eisini verður niðurstøðan hjá arbeiðsbólkinum, ið landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum nú hevur sett júst við tí setningi at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

Eftir ætlan skal arbeiðsbólkurin verða liðugur við arbeiði sítt 1. februar næsta ár, so her er nakað at síggja fram til.

Hóast ógreiðu viðurskiftini, ið valda á hesum øki í løtuni, hevur Tórshavnar kommuna eftir førimuni roynt at bøtt um umstøðurnar á hesum øki.

M.a. við Ellis- og Umlættingarheiminum.

Fyri tveimum árum síðani keypti og umbygdi kommunan eisini fyri egna rokning eini hús Oman Hoydalar, sum í dag virka sum eldrasambýli við plássi fyri 8 búfólkum og tveimum umlættingarplássum.

Viðgangast skal, at hetta ikki munar nógv, tá tørvurin jú er nógvar ferðir størri, men upplýsast kann, at aðrar ábøtur eru á veg.

Kommunan arbeiðir í løtuni við ætlanum um at byggja onnur sambýli umframt dagtilhald fyri senildement, og fyribils eru grundstykki løgd av til endamálið úti í Vallalíð og við Vegin Langa.

Vónandi verður politisk undirtøka fyri at skunda undir hesar ætlanir, tá íløgurnar hjá kommununi næsta ár, sum siðvenja er, verða markaðar í januarmánað.

Tjóðveldisflokkurin raðfestir trivnaðin hjá eldru borgarum okkara ovarlaga á dagsskrá síni.

Vinarliga

**Leivur Hansen,**
**borgarstjóri**

---

# Barnaansingarpláss – ein rættur

At vaksa upp undir tryggum korum er ikki øllum givið. Vit hava sum samfelag eina ábyrgd at skapa best møguligar karmar fyri allar borgarar, har vit serliga hava tey í huga, ið ikki kunnu syrgja fyri sær sjálvum.

Hetta ger barnaansingina - ella mangulin uppá somu - til eina uppgávu, ið størstur dentur skal leggjast á at fáa loysta.

Vit vilja virka fyri, at fleiri barnagarðar vera bygdir í komandi setu.

**Inga F. Hjallnafoss**
**Valevni hjá Sjálvsstýrisflokkinum**




## Hjálparfólk
### til Dagstovnin í Fuglafirði

Søkt verður eftir hjálparfólki, 30 t. viku. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. nov. 2000 til 1. nov. 2001. Starvið er á stovu við 18 børnum 3–8 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran í dagstovninum, tlf 444940 / 225222.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. oktober kl. 10.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður 10. oktober 2000*
**Fuglafjarðar býráð**



## Arbeiðsfólk søkist

Søkt verður eftir tímaløntum arbeiðsfólki til vegir og kloakkir og annað fyrifallandi arbeiði hjá kommununi.

Starvið verður roknað sum fulltíðarstarv.

Lønin verður sett eftir sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 443006.

Umsókn saman við skjølum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósadagin 26. oktober 2000.

**Leirvíkar kommuna**
Postrúm 42 · 520 Leirvík



## Prutl við skaða til sølu

**Merki:** Derby GPR 50
**Árg.:** juni 2000
**KM:** 1.375

Prutlið verður selt sum tað stendur nú og kann síggjast á deildini í Saltangará.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Deildin í Saltangará
tlf. 44 81 90 - fartlf. 28 26 94
fax nr. 44 80 77



## Maskinførari

Søkt verður eftir royndum maskinførara. Stóra koyrikortið fyrimunur.

**Sp/f í Djúpagili**
**tlf. 215921 og 315921**



## Frá Føroya Pleygarafelag

Ársaðalfundur verður tann 18. november 2000.

Fundarskrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**



Føroya Keypssamtøka

## søkir eftir lærlingi til handilin í Vágunum

Vit kunnu bjóða tær:
- eina fjølbroytta handilsútbúgving, undir skipaðum viðurskiftum.
- 40 tíma arbeiðsviku.
- frí annanhvønn leygardag.

Byrja: 01.11.00
Lærutíð: 3 ár
Krøv: FHS-útbúgving
Løn: sbr. S&K-sáttmálanum

Skrivlig umsókn saman við próvskjali skal sendast í seinasta lagi 23. okt. til

**FK Vágar**
att. Álvur Samuelsen
370 Miðvágur



## Stranda skúli

Søkt verður eftir 1 vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 30. nov. og skúlaárið út.

Starvið, sum er tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2000/2001 verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 27. oktober 2000.

**Sjóvar sóknar skúlanevnd**



## Til sølu

Renault Megane Senik árg. 1999, 18.000 km.

**Tlf. 212471**



**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Mentamáladeildin**

# Vikarur fyri landsantikvarin

Við hesum verður starvið sum settur landsantikvarur lýst leyst at søkja. Setanartíðin er frá setanardegnum til 1. august 2001.

**Uppgávur**
Høvuðsuppgávan hjá setta landsantikvarinum er at vera stjóri í Føroya Fornminnissavni, ið er undirskipað Undirvísingar- og Mentamálastýrinum og sambært lógum sínum skal virka fyri at:

- skráseta, kanna og hava eftirlit við jarðføstum fornminnum, sum lýst í løgtingslóg um friðing av fornminnum og bygningum
- fyrireika og standa fyri útgrevstri av toftum, fornum búplássum og søguligum lendum
- savna, skráseta og framsýna fornlutir og lutir frá nýggjari tíð, sum lýsa livihátt, starvslíkindi og mentan føroyinga til ymsar tíðir – ella eru knýttir til søguligar hendingar
- hava í hondum savnan av staðanøvnum og munnliga goymdum søguminnum – og hava hetta tilfar greitt til vísindaliga gransking
- hava eftirlit við bygdasøvnum og veita teimum hjálp og leiðbeining

**Faklig førleikakrøv**
Sett verður sum krav, at umsøkjarar hava lokna akademiska útbúgving í fornfrøði ella øðrum søguligum vísindum frá lærdum háskúla. Harumframt verður kravt at umsøkjarar hava leiðsluroyndir og kunnleika til savnsarbeiði. Granskingarroyndir innan søgulig, siðsøgulig ella samfelagslig vísindi eru ein fyrimunur.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava góð samstarvsevni, vera ágrýtnir, miðvísir og kunna arbeiða sjálvstøðugt – og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar. Umsøkjarar skulu hava góðan kunnleika til føroyskt mál.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Magistarafelag Føroya.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt fakliga krevjandi starv við nógvum avbjóðingum og samstarvi við aðrar stovnar og myndugleikar.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra (tel. 355050), ella Símun V. Arge, ið er settur landsantikvarur (tel. 310700), fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsókn við avritum av prógvum o.ø. skjølum, upplýsingum um leiðslu- og granskingarroyndir v.m. skulu vera Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. oktober 2000 – og sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 · 110 Tórshavn
Telefon 355050 · Fax 355056 · e-postur:
UMMS@UMMS.fo

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

**Føroya Fornminnissavn er stovnur undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Skrivstova v.m. er í Kúrdali í Hoyvík. Framsýningar eru í Hoyvík og Brekkutúni. Savnið hevur samstarv við aðrar mentanarstovnar í Føroyum og er eisini uppi í millumtjóða samstarvi.**